## Broyting í býráðnum

Síðani 1. november hevur varaborgarstjórin í Klaksvík, Jákup Mikkelsen, havt farloyvi frá býráðnum, men nú hevur hann aftur tikið sæti í býráðnum. Ein annar fólkaflokmaður, Atli S. Justinussen, hevur framvegis farloyvi og kemur ikki aftur í býráðið fyrr enn 1. februar. Nú Jákup Mikkelsen er komin aftur, er Jan Gardar farin úr býráðnum sum varamaður, meðan Erik Andreasen heldur fram, men nú fyri fyri Atla S. Justinussen.

(Kelda: www.klaksvik.fo)

## Tarvar og grind

Týskbøldið 9. januar, í annaðkvøld, fer Durita Holm, sum er mannfrøðingur í Spania, at hava hugleiðingar um tarvafekting og grindadráp. Tiltakið verður í Føroyahúsinum í Keypmannahavn. Durita Holm fer at hugleiða um, at ræltir menn drepa grind og tarvar, og teir hava nógv hár á bringuni og testosteron í blóðinum. Hon sigur, at tað er ikki heilt burturvið at samanbera ein føroyskan grindamann við ein spanskan tarvafektara.




# Norskt flogfar trupulleikar við flapsunum

**Hósnáttina noyddist eitt Boeing 737 hjá SAS við 86 ferðafólkum umborð at trygdarlenda í Langnes floghavn í Tromsø, av tí at brek vóru við flapsunum.**

FLOGFERÐSLA
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Tað gekk væl at lenda, hóast ferðin var munandi meira, enn um flapsini høvdu riggað.

Flogfarið var annars á veg úr Oslo til Evenes í Noregi, men hesum forðaði brekið fyri.

Heimasíðan Hangar.no samanber hendingina við støðurnar, ið flogfør hjá Atlantsflogi hava verið í seinastu mánaðirnar.






# Norðskála kirkja 75 ár

**Mikudagin eru liðin 75 ár síðani Norðskála kirkja varð vígd**

FÓLKAKIRKJAN
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Dagurin verður hátíðarhildin sunnudagin 28. januar við hátíðarmessu kl. 12. Hans J. Joensen, biskupur, prædikar, og sóknarprestinum á staðnum, Emil Olsen, hevur altartænastuna. Síðani verður døgurði á Hotel Eiði fyri innbodnum. Kl. 17 verður gudstænasta við Bjarna Bæk, dómprósti. Hátíðarhaldið endar við felagsmáltíð í bygdarhúsinum, Eydnuni, á Oyrarbakka. Á heimasíðu fólkakirkjunnar verður m.a. upplýst, at kirkjan til føðingardagin hevur fingið eina slupp.

Stoypiarbeiðið til kirkjuna byrjaði annars á Mortansmessu í 1930.

Kirkjan varð bygd í eini tíð, har togan var um um kirkjumálið skuldi verða danskt ella føroyskt. Sama ár var tí fólkaatkvøða um skriftstøðini undir altartalvuni og úti í forkirkjuni skuldu verða á føroyskum ella á donskum. Úrslitið var, at 40 atkvøður vóru fyri føroyskum og 29 fyri donskum.

Hin 10. januar 1932 vígdi Jákup Dahl, próstur, kirkjuna.

Í seinni helvt av sjeytiárunum varð farið undir at umvæla kirkjuna og varð tá eisini bygt uppí til fundarhølið o.a. Harumframt varð forkirkjan vaksin og kapell bygt upp í suðureftir.